# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800




*Hóast talan er um blaðungt føroyskt borðtennislandslið, so eiga flestu spælararnir longu oyggjaleikaroyndir í viðføringum*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

# Ættarliðsskifti í borðtennis gjøgnumført í øllum góðum

**Hóast tað er eitt ungt lið, sum fer til Álands at umboða Føroyar á Oyggjaleikunum, er ætlanin at gera vart við seg, og spælararnir miðja eftir aftur at vinna heiðursmerki eftir soltnu leikirnar á Rhodos fyri tveimum árum síðani**

BORÐTENNIS
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Orsøkin til, at so illa gekst í hond hjá borðtennis á Rhodos í 2007, kann partvíst finnast á leikunum í Hetlandi í 2005. Styrkismetingin og bólkingin verður gjørd eftir úrslitunum á undanfarnu leikum, og av tí at nøkur serstakliga løgin úrslit vóru í Hetlandi, endaðu tey sterkastu oyggjasamfeløgini í einum og sama bóki.

Millum annað var illgruni um, at Rhodos hevði tveir góðar grikkar á sínum liði í Hetlandi, og at tað tí forskjeyt styrkismetingina so nógv, at Rhodos fekk stóran fyrimun av hesum, tá oyggin hýsti leikunum í 2007.

Ein onnur orsøk kann helst eisini sigast at vera ættarliðsskiftið, sum er gjøgnumført seinnu árini. Í 2007 vóru allir spælararnir kanska ikki so klárir til stóru avbjóðingina, sum teir so hinvegin eru nú.

Kjartan Eli Hentze, sum var sterkasta føroyska kortið á fleiri leikum, er givin, og Thomas Rasmussen, sum vann gull í einstakligakappinginí í Hetlandi, hevur valt tónleikin fram um borðtennis, so hann ikki longur er virkin spælari. Tí hvílir alt nú á okkara egnu ungu spælarum.

## Spennandi nøvn

Og teir ungu spælararnir, sum eru tiknir út, eru hjá kvinnum Marin í Dali, Rakul Mikkjalsdóttir og Sheila Strøm, sum allar vóru við á Rhodos, og so er eisini unga Henriette Nielsen við hesa ferð. Hon hevur føroyska mammu og spælir við felagnum Søhøjlandet, sum hevur heimstað á Silkeborg-leiðini í Danmark.

Hjá monnunum er talan um Ragnar Egilsson, Róa Agnarsson og Hall Thorsteinsson, sum allir vóru við síðst, umframt Fróða Jensen, sum hevur fingið sera nógv burturúr á borðtenniseftirskúla niðri. Millum annað gjørdi hann ein vørr í FM-kappingini herfyri, tá hann vann á Róa í unglingafinaluni.

– Eg haldi, at vit eru komin sera væl ígjøgnum ættarliðsskifti, og hóast spælararnir eru ungir, hava teir fitt av royndum. Tí hava vit eitt ungt og gott lið, sum bjóðar av hesa ferð. Tey hava gjørt ótrúliga nógv við tað og eru væl fyri. Og eg veit frá spælarunum, at teir miðja eftir aftur at fáa heiðursmerki hesa ferð, eftir at tað var heldur soltið á Rhodos, sigur Andras Nolsøe, formaður í Borðtennissambandinum.

## Gera nógv við tað

Eftir at hava havt fyrst ein fraklending og síðani ein norðmann sum venjara, ið tó ikki hildu á serliga leingi, er danskarin Casper Løje Pedersen maðurin, ið skal leggja spælarunum lag á. Hann gevst í summar, men vil sjálvandi fegin enda við einum góðum oyggjaleikaúrsliti.

At nógv verður gjørt fyri at fáa góð úrslit, boða fyrireikingarnar frá, tí um ein lítlan mánað fer landsliðið til Grønlands at kappast. Upprunaliga var ætlanin, at bæði Føroyar, Grønland og Ísland skuldu vera við, men íslendingar góvu avboð, so í teirra stað er eitt danskt lið komið við. Har fáa spælararnir óivað góða dystar- og kappingarvenjing undan Oyggjaleikunum.

Umframt hetta, so kemur svenskarin Jan Berner, sum er kendur frá borðtennisumhvørvinum og eisini starvast sum norskur landsliðsvenjari, á vitjan í juni mánaði. Við sær hevur hann ein góðan norskan spælara, so tann vitjan fer helst eisini at kasta okkurt av sær, ið kann geva spælarunum góða barlast undan Álandsferðini.

## Borðtennis spælararnir

Marin í Dali
Rakul Mikkjalsdóttir
Sheila Strøm
Henriette Nielsen
Ragnar Egilsson
Rói Agnarsson
Hallur Thorsteinsson
Fróði Jensen

# Nulloysn í Barcelona

**Chelsea fekk tað, sum teir vóru úti eftir í fyrru hálvfinaluni á Nou Camp í Barcelona**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Chelsea fekk eitt gott útgangsstøði til seinnu hálvfinaluna á Stamford Bridge, tá teir ígjár megnaðu ein 0-0 javnleik á útivølli. Barcelona var tað betra liðið, men teir megnaðu ikki at fáa bóltin framvið Petr Cech í Chelsea-málinum.

Barcelona trýsti nógv, men teir manglaðu tað síðsta, sum kravdist fyri at bróta verjumúrin hjá Chelsea niður. Lionel Messi var lítið eyðsýndur, og tað sama kann sigast um Samuel Eto´o. Carlos Puyol hevur leikbann til returdystin, og tað kann vísa seg at fáa avgerandi týdning fyri Chelsea.

### Møguleikar beinaveg

Longu tá hálvurannar minuttir var farin, brendi Samuel Eto´o tann fyrsta stóra málmøguleikan hjá Barcelona. Thierry Henry testaði eisini Petr Cech. Barcelona trýsti nógv, men megnaði ikki at spæla seg til nógvar málmøguleikar. Chelsea hevði sín fyrsta málmøguleika, tá 37 minuttir vóru farnir.

Rafael Marguez í Barcelona-verjuni forerdi bóltin til Didier Drogba, sum gjørdist fríur við Barcelona-málverjanum, Victor Valdés. Drogba royndi seg tvær ferðir, men í báðum førum bjargaði Valdés.

Tíðliga í øðrum hálvleiki hevði Michael Ballack eisini eina góða roynd, sum hann stútaði beint upp um. Thierry Henry fekk ein løst í einum samanstoyti, og mátti fara av vøllinum. Rafael Marquez mátti eisini út við skaða. Sannlíkt er, at krossbandið er rokið.

Í yvirtíðini fekk Bojan størsta málmøguleikan í dystinum, tá hann tríggjar metrar frá málinum stútaði framvið málinum.